# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Svartkalvi. Túrur nr. 1724.
# Tíðarskeið: 27/5 - 7/6 – 2017.

**Fólk við frá Havstovuni:** Mourits Mohr Joensen, Marit Pedersen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund (kanningarleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna svartkalva: Nøgd, longd, vekt, aldur, kyn og kynsbúning. Umframt skuldu kanningar eisini gerast av øðrum fiskasløgum, sum vóru fingin.
Eisini var hitin við botn skrásettur. Nytru- og magaprøvar vóru tiknir av svartkalva, toski, upsa, longu, blálongu og brosmu.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 135 mm posa, rockhopper-grunnur, breitlar 120 m og Vágshurðar. Trolað varð vanliga í umleið 6 tímar. Miniloggarar vórðu nýttir til at máta sjóvarhita í trolinum.

## Um túrin:

Fóru av Havnini leygardagin 27/5 kl. 13:00 og byrjaðu at royna í kantinum norður-eystur úr Fugloy. Vit royndu í kantinum eystanfyri, serliga nærhendis kaðalinum, sum er eystan fyri Suðuroyarbanka. Vit gjørdu eitt legg suður á endan á Munkagrunninum. Eftir tað var ætlanin at fara í vestara kant á Munkagrunninum, men har var ikki roynandi, tí nógv svartkjaftaskip lógu júst har, sum ætlanin var at trola. Fóru síðan aftur í eystara kant og royndu eisini seinni í norðara kanti. Vóru á Havnini eftir loknan túr týsdagin 6/6 kl. umleið 12 og landaðu á Bacalao. Tilsamans 31 hál vórðu góðkend og gjørd upp. Veðrið var sera gott allan túrin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu og nytrur (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 7. juni 2017.

**Fyribilsúrslit:** Tað var væl minni at fáa av svartkalva enn vanligt hevur verið seinastu árini, sum annars hava verið avbera góð (Mynd 1). Veiðan av svartkalva var bert umleið helvtin í mun til 2015 (Talva 1). Minkingin var eisini at síggja í 2016, tó at bert 8 hál vórðu tikin tað árið vegna tekniskar trupulleikar við skipinum. Tað var eisini minni at fáa av trantkongafiski og stóra kongafiski. Nakað meira var at fáa av toski og smáfiskur var ímillum. Fleiri magar vórðu kannaðir á túrinum. Føðin hjá svartkalva var í høvuðsheitum svartkjaftur, meðan tað kom fyri, at onkur einstakur svartkalvi hevði etið makrel ella sild. Svartkjaftur var eisini høvuðsføðin hjá upsa, toski, blálongu og brosmu. Hóast tað er ósemja um, hvussu aldur skal lesast í svartkalvanytrum, var hetta gjørt á túrinum. Úrslitini bendu á, at svartkalvin vaks umleið 2,8 cm um árið, og samsvarar hetta væl við vøksturin frá merkingarroyndum.

**Talva 1.** Veiða (kg), og nytrur/magar tikin á túri 1724.

| FISKASLAG | KG 2017<br>31 hál | Nytrur | Magar | KG 2015<br>29 hál | Lutfall<br>KG<br>per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| SVARTKALVI | 14219.071 | 470 | 197 | 28220.411 | 0.47 |
| TRANTKONGAFISKUR | 3956.104 | | | 5613.856 | 0.66 |
| TINDASKOETA | 1747.798 | | | 4361.241 | 0.37 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 540.975 | | | 1804.996 | 0.28 |
| TOSKUR | 410.340 | 56 | 33 | 150.945 | 2.54 |
| BROSMA | 314.020 | 84 | 11 | 971.681 | 0.30 |
| HALAHVASSA SKØTA | 296.830 | | | 793.855 | 0.35 |
| UPSI | 205.320 | 36 | 19 | 1421.180 | 0.14 |
| BLÁLONGA | 171.395 | 18 | 6 | 825.918 | 0.19 |
| LÁLLA | 146.105 | | | 89.757 | 1.52 |
| SVARTKJAFTUR | 144.308 | | | 148.091 | 0.91 |
| HAVTASKA | 107.150 | | | 58.030 | 1.73 |
| GULLLAKSUR | 62.275 | | | 34.670 | 1.68 |
| HVASSASPREK | 44.805 | | | 32.757 | 1.28 |
| LONGA | 42.610 | 5 | 1 | 341.822 | 0.12 |
| KLINGRUSKØTA | 38.425 | | | 161.772 | 0.22 |
| HVÍTASKØTA | 27.485 | | | 731.425 | 0.04 |
| GAMAL FISKUR | 26.458 | | | 0.000 | |
| BLÁGÓMUR | 25.467 | | | 251.903 | 0.09 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 18.749 | | | 205.808 | 0.09 |
| HAVMÚS | 13.767 | | | 10.563 | 1.22 |
| LÍTLABROSMA | 11.833 | | | 6.901 | 1.60 |
| LIRI | 5.305 | | | 45.825 | 0.11 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 3.470 | | | 7.607 | 0.43 |
| ÚLVFISKUR | 3.290 | | | 2.021 | 1.52 |
| HÝSA | 2.245 | 1 | | 12.775 | 0.16 |
| TRØLLAKRABBI | 0.595 | | | 0.000 | |
| KRYTTLINGUR | 0.580 | | | 0.000 | |
| SKRAMBUL | 0.460 | | | 9.016 | 0.05 |
| RÆKJA | 0.299 | | | 0.015 | 18.65 |
| LÍTLA LAKSATOBIS | 0.247 | | | 0.000 | |
| KROSSFISKUR | 0.180 | | | 0.000 | |
| TILSAMANS | 22587.961 | 670 | 267 | | |




**Mynd 1.** Veiða av svartkalva í tíðarskeiðnum 1995-2017. Í 2010 var bert 1 hál tikið og úrslitið er tí ikki víst. Í 2016 vóru bert 8 hál tikin.

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru at finna í dokumentinum Tur1724d.doc.

Petur Steingrund